


www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 03 - 2012

# Enn ein stjóri í Dong fallin

Tað er líkt til, at Anders Eldrup kann taka fleiri í leiðsluni í Dong Energy við sær í fallinum. Í hvussu er veit Børsen at siga, at varastjórin Jakob Baruel Poulsen er frítikin fyri tænastu, og at avgerðin er ein beinleiðis avleiðing at teirri advokatkanningini, sum varð sett í verk í sambandi við uppsøgnina av forstjóranum. Jakob Baruel Poulsen hevur fyrr arbeitt í fíggjarmálaráðnum, tá Anders Eldrup var aðalstjóri har. Í gjár kom fram, at nevndin í Dong Energy hevði givið Anders Eldrup sekkin, tí hann hevði verið í so blíður við nakrar av sínum medarbeiðarum. Sambært nevndarformanninum hevði forstjórin givið fýra medarbeiðarum stóra lønarhækking og sera góðar fráfaringaravtalur, uttan at nevndin var vitandi um tað. Børsen hevur tosað við Jakob Baruel Poulsen, men hann hevur onga viðmerking til, at hann nú er frítikin fyri tænastu. Sambært Børsen skrivar setti stjórin í Dong Energy, Carsten Krogsgaard Thomsen, í einum innanhýsis teldubrævi, at málið er sera óheppið fyri fyritøkuna, men at tað eftir øllum at døma bara snýr seg um nakrar heilt fáar medarbeiðarar.